# KIRKJUGRUNNURIN

ÁRSROKNSKAPUR

2007

# Innihaldsyvirlit

ROKNSKAPARFRAMLØGA 4

UM ÁRSROKNSKAPIN 2007 5

RAKSTRARROKNSKAPUR TÍÐARSKEIÐIÐ 29. JULI – 31. DESEMBER 2007 6

FÍGGJARSTØÐA TANN 31. DESEMBER 2007 8

# Roknskaparframløga

Hjáliggjandi ársroknskapur fyri 2007 verður sambært § 24, stk. 3, í Ll. nr. 61/2007 hervið lagdur fyri landsstýrismannin at góðkenna.

Tórshavn, 3. juli 2008

**Føroya Stiftsstjórn**

Stiftsstjórnin:

Jógvan Fríðriksson, biskupur

Tummas Lauritsen

Durita Tausen

# Um ársroknskapin 2007

Kirkjugrunnurin varð settur á stovn við løgtingslóg nr. 61 frá 7. juni 2007 "um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar".

Sambært § 24, stk. 1, í Ll. nr. 61/2007 fylgir roknskaparárið hjá Kirkjugrunninum álmanakkaárinum. Tó er fyrsta roknskaparárið fyri tíðarskeiðið 29. juli 2007 til 31. desember 2007.

Sambært § 24, stk. 3, leggur Føroya stiftsstjórn roknskapin hjá Kirkjugrunninum fyri landsstýrismannin at góðkenna.

Niðanfyri eru rakstrarroknskapur fyri 2007 og fíggjarstøða tann 31. desember 2007, og greitt verður frá teim serligu fyribrigdum, ið eru galdandi fyri fyrsta roknskaparárið. Í notum til fíggjarstøðuna verður greitt frá, hvat ymsu roknskaparpostarnir fevna um. Rakstrarroknskapur og fíggjarstøða eru sett upp eftir sama leisti, sum nýttur verður til "eksternar grunnar", ið verða tiknir við í landsroknskapinum sum fylgiskjøl.

# RAKSTRARROKNSKAPUR tíðarskeiðið 29. juli – 31. desember 2007

**Kirkjugrunnurin**
Stovnsnummar (001038)

**Rakstrarroknskapur**

| Tús. kr. | 2007 |
|---|---|
| Úrslit | 0 |
| Útreiðslur | 34.837 |
| Inntøkur | 34.837 |
| | |
| Nettoútreiðsla | 0 |
| | |
| **Útreiðslur** | **34.837** |
| 11 Lønir v.m. | 5.435 |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 833 |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | - |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 145 |
| 52 Tilskot til einstaklingar | 6 |
| 54 Stuðul til annað virksemi | 9.772 |
| 71 Innanh. flyt. millum alm. stovnar, útreiðsla | 18.521 |
| 75 Keyps-mvg | 125 |
| | |
| **Inntøkur** | **34.837** |
| *21 Sølu av vørum og tænastum* | 6 |
| *61 Skattur og avgjøld* | 25.777 |
| *63 Vanligar flytingarinntøkur* | 3.000 |
| *64 Aðrar flytingarinntøkur* | 4.755 |
| *65 Flytingar úr Danmark* | 1.166 |
| *67 Rentuinntøkur og vinningsbýti* | 132 |
| *76 Innanh. flyt. millum almennar stovnar, inntøka* | - |

## Almennar viðmerkingar:

Sambært § 23, stk. 4 og 5, í Ll. nr. 61/2007 verður møguligt rakstraravlop hjá Kirkjugrunninum avroknað við Tiltaksgrunnin, og møguligt rakstrarhall verður fíggjað av Tiltaksgrunninum. Rakstrarúrslitið hjá Kirkjugrunninum er tí á hvørjum ári null, og Kirkjugrunnurin hevur tí onga sjálvstøðuga eginogn. Standardkontur 71 og 76 ”Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar”, ávikavist útreiðslur og inntøkur, verða nýttar at flyta ávikavist rakstraravlop úr Kirkjugrunninum og/ella at flyta upphædd til Kirkjugrunnin at fíggja rakstrarhallið við.

## Viðmerkingar til einstakar roknskaparpostar:

Konta 54 Stuðul til annað virksemi fevnir um tann rakstrarstudning, sum Kirkjugrunnurin sambært fíggjarætlan, ið er løgd fyri einstaka fíggjarárið, rindar einstøku kirkjuráðunum – til rakstur av fólkakirkjunum. Harafturat fevnir kontan eisini um tær upphæddir, sum nú avtikni "Færøernes Kirkefond" hevði givið tilsøgn um – til umvæling av einstøku fólkakirkjunum.

Fyri fyrsta roknskaparárið fevnir konta 61 Skattur og avgjøld um 3 ymiskar uppgerðir. Lutvíst er talan um kirkjuskatt, ið er avroknaður við Kirkjugrunnin fyri tíðarskeiðið 29. juli til 31. desember 2007, 14,7 mió.kr. Harafturat er eisini talan um góðar 2,8 mió.kr., ið eru goldnar Kirkjugrunninum sambært § 31, stk. 4, har ásett er, at "eftirregulering av kirkjuskatti til og við 2006 verður avroknað við Kirkjugrunnin". Umframt hetta eru avroknaðar umleið 8,3 mió.kr., sum tann parturin av kirkjuskattinum fyri tíðarskeiðið 1. januar til 29. juli 2007, sum ikki eru goldnar kirkjunum í rakstrarstudningi sambært § 21, stk. 1, í "Anordning nr. 887 fra 8. december om ikrafttræden for Færøerne af lov om folkekirkens økonomi, som senest ændret ved anordning nr. 1602 af 20. december 2006".

Konta 63 Vanligar flytingarinntøkur fevnir um játtanina á løgtingsfíggjarlógini 2007 til Kirkjugrunnin, sum er ætlað rakstrinum av fólkakirkjuni, t.d. lønir hjá prestum o.t.

Konta 64 Aðrar flytingarinntøkur fevnir um uppspardu eginognina í "Færøernes Kirkefond", sum sambært § 32, stk. 1, varð latin Kirkjugrunninum. (Av tí at Kirkjugrunnurin ikki hevur eina sjálvstøðuga eginogn, men á hvørjum ári avroknar við Tiltaksgrunnin møguligt rakstraravlop ella – hall, verður mett rættast at inntøkuføra eginognina hjá "Færøernes Kirkefond", heldur enn at bóka nevndu eginogn sum stovnsfæ e.l.).

Konta 65 Flytingar úr Danmark fevnir um upphædd, 1,17 mió.kr., ið er peningur – sonevndir "kapitalar" – sum vóru knýttir at teim prestagørðum, ið Mentamálaráðið í 2007 keypti frá Kirkeministeriet (Folkekirkens Fællesfond). Peningurin er ætlaður til viðlíkahald av yvirtiknu prestagørðunum. Talan er um "eingangsinntøku", ið bert verður flutt Kirkjugrunninum, nú ið Føroyar hava yvirtikið fólkakirkjuna.

# FÍGGJARSTØÐA TANN 31. DESEMBER 2007

## OGN:

| Notur: | | 2007 |
|---|---|---|
| | **Útbúnaður** | |
| 1 | Grundøki, bygningar, løgur o.t. | 17.600 |
| | Samlaðar avskrivingar | -17.600 |
| | Virðisbrøv | - |
| | Útlán | - |
| | Útbúnaður tilsamans | 0 |
| | **Virði í umferð** | |
| | Goymslur | - |
| 2 | Aðrir skuldarar | 19.954 |
| 3 | Tøkur peningur | 8.939 |
| | Virði í umferð tilsamans | **28.893** |
| | **OGN TILSAMANS** | **28.893** |

## ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

| | | |
|---|---|---|
| | **Útjavningarkonta** | |
| | Salda 1. januar | 0 |
| 4 | Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit | 0 |
| | Útjavningarkonta tilsamans | **0** |
| | **Skuld** | |
| 5 | Umsiting av ogn hjá øðrum | 2.917 |
| 6 | Millumrokning við Kirkeministeriet | 4.962 |
| 7 | Millumrokning við landskassan | 2.174 |
| 8 | Millumrokning við Tiltaksgrunnin | 18.521 |
| 9 | Stuttfreistað skuld o.t. | 318 |
| | **Skuld tilsamans** | **28.893** |
| | **ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS** | **28.893** |

## Viðmerkingar til fíggjarstøðuna:

Nota 1: Mentamálaráðið keypti í 2007 fyri 17,6 mió.kr. 8 prestagarðar frá Folkekirkens Fællesfond, og hesir eru latnir Kirkjugrunninum. Talan er um bispagarðin, um próstagarðin í Havn og um prestagarðarnar í Vestmanna, í Hvalvík, í Havn, á Gjaranesi, á Nesi og í Klaksvík. Av tí at yvirtiknu

prestagarðarnir longu eru avskrivaðir, verða samlaðu avskrivingarnar vístar, soleiðis at prestagarðarnir eru tiknir við til virðið "null".

Nota 2 "Aðrir skuldarar" - fevnir í høvuðsheitum um áogn av kirkjuskatti, sum Kirkjugrunnurin hevur mótvegis landskassanum.

Nota 3 "Tøkur peningur" - fevnir bæði um tøkan pening hjá Kirkjugrunninum og um pening, umleið 2,9 mió.kr., sum Kirkjugrunnurin umsitur fyri onnur – sí notu 4 "Umsiting av ogn hjá øðrum".

Nota 4 "Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit" - omanfyri er greitt frá, at rakstrarúrslitið hjá Kirkjugrunninum á hvørjum ári er null, tí møgulig rakstraravlop ella –hall verður avroknað við Tiltaksgrunnin yvir raksturin hjá báðum grunnum.

Nota 5 "Umsiting av ogn hjá øðrum" - talan er um pening, sum í fólkakirkjunum verður savnaður inn til ymisk endamál – t.d. til bíbliufelagsskapir, til missiónsarbeiði o.s.fr.

Nota 6 "Millumrokning við Kirkeministeriet" – flestu prestarnir verða enn løntir av Kirkeministeriet, men Kirkjugrunnurin ber útreiðsluna. Tí vil Kirkjugrunnurin framvegis hava eina skuld mótvegis Kirkeministeriet. Harafturat er talan um, at Kirkjugrunnurin og Kirkeministeriet skulu gera upp millumverandi í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni. T.d. er talan um at gera upp eftirlønarskyldurnar, og um at Kirkeministeriet í august og september 2007 av misgáum flutti "fyrrverandi stiftsstjórnini" tey rakstrargjøld, sum skuldu verið flutt, um fólkakirkjan ikki varð yvirtikin.

Nota 7 "Millumrokning við landskassan" – roknskaparhaldið hjá Kirkjugrunninum er partur av búskaparrenslinum hjá landinum, hóast roknskapurin hjá Kirkjugrunninum ikki er partur av landsroknskapinum. Orsøkin til tætta knýtið er, at kirkjuskattur verður kravdur inn av landinum, og at bókhaldið hjá grunninum fer fram í Búskaparskipan landsins.

Nota 8 "Millumrokning við Tiltaksgrunnin"- ársúrslitið hjá Kirkjugrunninum verður á hvørjum ári avroknað við Tiltaksgrunnin. Tí verður altíð ein millumrokning/útjavningarkonta við Tiltaksgrunnin. Gjaldførið liggur framvegis í Kirkjugrunninum.

Nota 9 "Stuttfreistað skuld"- talan er um stuttfreistaða skuld hjá "Færøernes Kirkefond" o.a., sum enn ikki er avroknað.